# nini koma her






*Rannvá Andreassen í 1. flokki hevur júst latið inn eina uppgávu, sum lærarin, Jóhannes Johannessen úr Klaksvík skal rætta*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

børnini í Haraldssundi koma til okkara skúla.

**Stuttligt**

Saman við bróðuri sínum, níggju ára gamla Ivan Josephsen sum gongur í 3. flokki, kenna teir ikki til annan skúla enn henda.

Teir hava havt skiftandi lærarar, men hetta hevur ikki tikið hugin at ganga í skúla frá teimum.

– Nei, hetta er ein góður skúli. Tað er stuttligt at ganga her, slær Jón fast. Og bróðurin nikkar samtykkjandi.

Teir eru kortini ikki bert í skúlanum her í Kunoy. Hvønn mánadag fara børnini í skúlanum til Klaksvíkar at svimja. Um sama mundið koma eisini skúlabørn av Húsum og Haraldssundi í somu ørindum.

– Tað er fínt at fara til Klaksvíkar at svimja. Men annars haldi eg, at vit skulu ganga í hesum skúlanum, slær Jón Josephsen fast.

*snorri@sosialurin.fo*

# Bert EIN skúli

*Skúlastýrini í Norðoyggjum hava saman viðgjørt uppskotið til løgtingslóg um fólkaskúlan, ið landsstýriskvinnan í skúlamálum, Helena Dam á Neystabø hevur lagt fyri tingið. Í viðgerðini hava skúlastýrini kjakast um framtíðina hjá skúlunum í økinum. Í niðurstøðu frá fundinum verður soleiðis tikið til:*

*»Á Kunoynni eru eisini tveir skúlar, ein í Kunoy og ein í Haraldssundi. Her verður sagt, at næmingatalið er ov lítið til at hava tveir skúlar. Men einki verður kortini sagt um, hvør skúli eigur at verða lagdur niður«.*

# KÍ

**Brøðurnir báðir, Jón og Ivan Josephsen hava nokk at gera eftir at skúladagurin er at enda komin.**

**– Okkum dámar væl at spæla teldu, hoppa í trampolin, sparka og sóritt, siga teir báðir. Ivan spælir enntá við smápiltunum hjá KÍ. Teir venja mikudag og fríggjadag, og sovítt hann visti, skuldu teir spæla dyst um nakrar dagar. Ímóti hvørjum, visti hann ikki tá.**